


# Má fáa avleiðingar



Sveinur Tróndarson er formaður í Kappingarnevndini hjá FSF, sum nú skal taka støðu til, um teir heita á Aganevndina um at taka hendingina í Gøtu upp til viðgerðar. Meðan málið verður viðgjørt, fær formaðurin í Kappingarnevndini illa gjørt nakrar ítøkiligar viðmerkingar, men hann sigur kortini, at FSF noyðist at fyrihalda seg til viðurskiftini á vøllinum. Eisini hóast talan er um hendingar, sum bert upptøkutólið hevur fangað. - Vit, sum varða av fótbóltinum, eru noydd at taka mál av hesum slag upp, tí spælararnir mugu vita, at nøkur ting bera avleiðingar við sær. - Men gera vit tað, so haldi eg samstundis, at tað er neyðugt við nøkrum føstum mannagongdum, og at hesar verða hildnar, sigur Sveinur Tróndarson.

**-mørk**

# FSF hevur ein trupulleika

**Vantandi linjan í disciplinér-revsingum er í ferð við at gerast ein stórur trupulleiki hjá Fótbóltssambandinum**



*Tað gekk heitt fyri seg í eysturoyaruppgerðini í Sarpugerði seinasta mikukvøld. Dómarin fekk ikki alt við, og nú skal FSF taka støðu til tað, sum dómarin ikki sá*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað munnu vera tey allarflestu, sum eru samd um, at sjónvarpsmyndirnar úr Sarpugerði eftir dystin millum Víking og B68 mikukvøldið í farnu viku vóru lítið hugaligar.

Atlia Gregersen og Hans Jørgen Djurhuus løgdu hvør í sínum lagi eftir Jann Inga Petersen, eftir at dómarin hevði bríkslað seinasta bríkslið. Tað eydnaðist eisini Hans Jørgen at fella mótstøðumannin, men hvørki dómari ella hjálpardómarar sóu tilburðin, sum tí ikki stóð á dómarans frágreiðing eftir dystin.

Um vikuskiftið var aftur hending á Sarpugerði, har Herbert í Lon Jacobsen helst fær leikbann fyri at hava verið í hornatøkum við Andreas Lava Olsen eftir dystin millum Víking og B36. Men tann hendingin er noterað á dómarafrágreiðingini, skilst, og tí verður talan ikki á sama hátt um disciplinermál.

Hóskvøldið vóru tað sjónvarpsmyndirnar, sum talaðu sítt týðuliga mál um tilburðin, og FSF hevur eisini boðað frá, at málið verður tikið upp.

Aðra staðni er vanligt, at sjónband verður nýtt sum prógv, og tað hevur eisini verið gjørt áður í Føroyum. Í so máta er eingin trupulleiki.

Trupulleikin er, at mannagongdirnar higar til ikki hava givið nakra serliga rættartrygd til teir spælarar, sum verða fangaðir í beistagerðum sínum. Fyrsti dómurin, sum fall í hesum, var í 2005, tá Bergur Midjord fekk tríggjar daga leikbann fyri at skvetta nakrar dropar av vatni eftir Jón Johannesen, sum eisini fekk longt leikbann fyri tilburðin.

Undan kappingarárinum hevði FSF ta ferðina boðað frá, at teir nú fóru at brúka sjónvarpsmyndir sum prógv, um talan skuldi verða um disciplinerdóm. Og alt gott um tað.

Tað var tó skjótt, at linjan skeikladist. Í vikunum eftir hetta vóru tvær hendingar at síggja í sjónvarpinum, har HB-spælari sló klaksvíking í búkin, og har B68-spælari klípti spælara hjá VB/Sumba millum beinini. Báðar hendingarnar vóru sjónligar á skíggjanum, men hvørgin fekk avleiðingar fyri spælaran.

Og sum so hevur linjan – ella mangul upp á sama – eisini verið galdandi fyri útsagnir hjá spælarunum og venjarum. Ein viðmerking, sum í botn og grund ikki var annað enn ein útsøgn um vánaligt dómaraavrik, kostaði Bartal Eliasen tveir daga leikbann. Hinvegin hava aðrar útsagnir seinastu tvey árini frá eitt nú Kurt Mørkøre, Christian Lundberg og nú seinast Niclas Niclasen ikki kostaðu leikbann, hóast hesar vóru álop á integritetin hjá dómaranum.

Fyri at venda aftur til málið í Gøtu mikukvøldið, so hevur Kappingarnevndin fráboðað, at málið verður tikið upp. Enn er tó eingin úrskurður gjørdur, og tað verður heldur ikki Kappingarnevndin Men Aganevndin, sum ger hendan.

Eisini her hevur linjan í kæruviðgerðum verið heldur trupul at fáa eyga á. Og hóast tað skundar undir viðgerðirnar, so er tað ein veikleiki í skipanini, at revsingin skal upp um ávíst mark, áðrenn mál kunnu kærast víðari. Her var ítróttardómstólurin áður eitt amboð, sum fótbólturin eisini kundi nýta, og avgerðir her hava áður staðfest, at tað ikki ber til, at revsilinjur verða skaptar út frá einstøkum hendingum. Hetta tí eitt nú videoprógv er av somikið prinsipiellum týdningi, at tey krevja eina viðgerð, áðrenn tey verða tikin í nýtslu.

Ta viðgerðina hevði FSF kanska um ársskiftið 2004/2005, men eftirtíðin hevur so ikki víst nakra linju í hesum.

Og tí hevur FSF ein trupulleika. Øll kunnu væl vera samd um, at eitt mark skal vera fyri atburði á vøllinum. Og tað má standa bæði spælarum og venjarum greitt, at verður farið um markið, so fær hetta avleiðingar.

Trupulleikin hjá FSF er, at markið ongan tíð er sett. Og í øllum førum hevur marknaðeftirlitið verið sera tilvildarligt!

Skála-KÍ:

# Botnbrakið er í kvøld

**Talan er um sannan gysara á Skála, har talan er um seinasta útkall hjá heimaliðnum, men har trýstið kanska er størri á gestunum**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Flytur Skála niður, so er hetta ein staðfesting av tí, sum nógv spáddu undan kappingarbyrjan. Og nøkur vanlukka er tað ikki fyri felagið, hóast tey sjálvandi vilja halda fast um sessin, sum Skála hevur hildið fast um, síðani uppflytingin varð veruleiki á heysti 2001.

Hinvegin er talan um alt annað enn hugaliga støðu hjá KÍ. Enn er liðið oman fyri niðurflytingarstrikuna, men bara tað at liva í niðurflytingarvanda er alt annað enn hugaligt hjá siðvanda felagnum, sum saman við HB er einasta felagið, sum altíð hevur átt umboðan í bestu deildini. Og tí kann talan gerast um nærum vanlukkuliga støðu í Klaksvík, kemur niðurflytingarvandin nógv nærri, enn hann er í løtuni.

Um ikki annað, so kunnu báðir venjararnir fegnast um, at teir hava allar mans tøkar.

Hjá Skála var Arnhold Berg leikbannaður seinast, men hann er nú aftur tøkur hjá John Petersen, sum ikki sigur seg hava skaðar av nøkrum slag at hugsa um í løtuni.

Hjá KÍ vóru Rodrig da Silva og Milic Curcic burtur frá seinast. Talan var tá um innanhýsis leikbann, sum varð givið av disciplinerum ávum, men teir eru nú aftur tøkir hjá venjaranum. Frá Fótbóltssambandinum eru eingi leikbann, og skaðar eru heldur ikki í hópinum, verður sagt.